# Vikuskifti

Nr. 152 • Vikuskiftið 13.–14. august 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

Ábyrgdarleys koyring og ferðtálmar

Tinghellan s. 34-35.

TING-HELLAN




# Veðrið hevur bara *næstan* alt at siga…

SUMMARFESTIVALUR

*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

– Vit eru sera væl nøgd við Summar Festivalin hesaferð, sum var næstan dupult so væl vitjaður, sum fyrsti Summar Festivalurin í fjør.

Hetta sigur Steintór Rasmussen, høvuðsmaður aftan fyri Summar Festivalin, nú tey hava havt fyrstu eftirmetingarnar.

Í fjør vóru tey gott og væl 4.000, ið vitjaðu festivalin, meðan talið í ár var 8.000.

– Hetta skuldi sjálvandi sæst aftur í kassanum, men eyðvitað vóru onkrar dýrar loysnir funnar beint áðrenn festivalin. Men hetta skuldi so givið okkum gott grundarlag til næsta festival. Í øllum førum kunnu vit siga, at støðið nú er lagt, sigur Steintór Rasmussen.

Næsti Summar Festivalur verður vikuskiftið 4. og 5. august næsta ár. Ætlandi verða eisini tiltøk sunnudagin 6. august.

Steintór Rasmussen sigur, at tað altíð eru viðurskifti, ið bøtast kann uppá, og hesum verður eisini arbeitt við, tí tað eru tey góðu tilboðini, sum skulu selja festivalin.

Eitt av málunum, Steintór Rasmussen nevnir, er at bøta um viðurskiftini hjá børnunum.

– Vit ætla at útbyggja spæliplássið. Tað skal gerast enn meira áhugavert, og børnini skulu fáa meira fyri pengarnar, sigur hann. Møguliga fer at bera til at keypa eitt armband til børnini, sum gevur atgongd til øll tiltøkini.

Festivaløkið verður eisini útbygt soleiðis, at allur bøurin á Akursmørk verður tikin upp í økið.

Veðrið hevur altíð stóran týdning, tá tað snýr seg um uttanduratiltøk í Føroyum. Fólk hava eisini havt á munni, at um onkur av festivalinum verður raktur av ringum veðri og regni, so fer alt fyri skeytið. Men Summar Festivalurin gjørdi hesum til skammar og vísti, at veðrið hevur bara næstan alt at siga!